LM-070/2023

Fylgiskjal 6

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
FO- 100 Tórshavn

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 28.11.2023
J. nr. (MEGD): 701-5-2023
Ummælistíð
1. uppskot: 16.06.2023 til 04.08.2023
2. uppskot: 14.11.2023 til 28.11.2023

Hoyringarskriv viðvíkjandi
Uppskoti til Løgtingslóg
um vevnaðarskrá, genomskrá, diagnosuskrá og ættarbandsskrá til gransking í mannaflegum og persónlagað medisin [Ílegulógin II]
(*Uppskot til nýggja ílegulóg*)

MEGD vil takka fyri høvið at senda hoyringarskriv bæði til fyrra og seinna uppskot.

1. MEGD fegnast um, at hoyringartíðin í fyrra uppskotinum var áleið 7 vikur. Samstundis verður víst á, at tað var avbjóðandi at savna viðkomandi partar í summarfrítíðini. Eisini er uppskotið sera umfatandi, so um umstøður, orka og summarfrítíðin ikki vórðu forðingar, hevði tað verið ynskiligt við einum ávísum greiningararbeiði og at ein hoyringarfundur var skipaður, har limafeløg kundu luttikið, um tey høvdu áhuga.

2. Í sambandi við seinna uppskotið hevði tað verið ein fyrimunur, um hoyringartíðin samsvaraði við galdandi rundskriv um lógarsmíð[1], og sostatt ikki var styttri enn 4 vikur. Við hesum fyrivarnum, vil MEGD halda seg til at viðmerkja fylgjandi viðurskifti í uppskotinum.

3. Nevnda uppskot setur forboð ímóti mismuni, sambært kapituli 7, grein 25, ið ásetur, at *ein og hvør mannamunur móti einum persóni, grundaður á hansara ílegurarv, er bannaður.*

[1] s. 27, *Rundskriv um lógarsmíð*. Løgmansskrivstovan, januar 2019.
[www.lmr.fo/fo/arbeidsoeki/logartaenasta-og-logarsmid/rundskriv-um-logarsmid]

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

- Sambært serligu viðmerkingunum til grein 25, er endamálið við grein 25 *at forða fyri, at úrslit av arvafrøðiligum royndum verða nýtt til ógrundaðan mannamun.*
- Talan er *um eina meginreglu, ið er ásett út frá meginreglunum í mannarættindasáttmálanum um forboð móti mannamuni orsakað av kyni, ættarslagi, húðaliti, tungumáli o.a.*

4. MEGD vil gera vart við, at uppskotið eisini eigur at taka atlit til, at altjóða brekrættindasáttmálin setur bann móti øllum mismuni vegna brek, og at hugtakið *mismunur grundaður á brek* skal skiljast sum:

   - *ein og hvør munur, útihýsing ella avmarking, grundað á brek, sum hevur til endamáls ella sum ávirkan at skaða ella gera til einkis, at fólk við breki javnbjóðis øðrum kunnu viðurkenna, njóta og nýta øll mannarættindi og grundleggandi politisk, búskaparlig, sosial, mentanarlig, borgarlig ella onnur frælsi. Tað fevnir um allan mismun, eisini at fáa noktað rímiligar tillagingar.*

5. Til tess at verja fólk, ið bera brek, og avvarðandi og eftirkomarar teirra, ímóti mismuni ella útihýsing, eigur ein grundleggjandi treyt at verða sett við, ið tryggjar at øll nýtsla av mannaílegum, eitt nú til gransking, hagtøl, kunning, vegleiðing, vitlíki, tøkni, marknaðarførslu ella annað, eigur at verða nýtt við greiðum samtykki frá viðkomandi brúkara, ið eigur íleguna.

6. Samtykkið frá brúkarum eigur at verða skriva niður í ein sáttmála, ið greitt staðfestir rættindi hjá brúkaranum og skyldurnar hjá teimum pørtum, ið gagnnýta ílegurnar.

7. Serlig atlit eiga at verða tikin til rættindini hjá fólki, ið bera brek, ið ikki fáa samskift sjálvi, og tí einans kunnu geva samtykki umvegis ein verja.

8. Áhaldandi og munagott eftirlit eigur at verða við, um sáttmálin um samtykki frá brúkarum verður virdur. Eftirlitið eigur serliga at fylgja við í tá ætlanin er at geva loyvi til at ílegurnar verða brúktar til nýggj endamál.

9. Sum meginregla eiga serlig atlit at verða tikin til, at føroyski brúkarin, ið ber brek, sum hevur givið greitt samstykki til nýtslu av egnum ílegunum, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis er fyri mismuni orsaka av útlendskum pørtum, eitt nú heilivágsfyritøkum, granskingarstovnum ella øðrum.

10. Hetta merkir eisini, at atkoma í breiðari merking (talgild, luttøka, fysiskir karmar, kunning o.a.) til viðkomandi skráir, gransking, úrslit og heilivág eiga at verða tillagað á rímuligan hátt. Hetta kann eitt nú vera í mun til at

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

tryggja at samskiftið er nøktandi, eitt nú við fólk, ið eru blind ella deyv, fólk við niðursettari hoyrn, fólk við menningartarni, lesi- og skriviveik, fólk, ið hava demens og fólk, ið hava sálarsjúku. Eisini eigur hædd at verða tikin til aldur, kyn, landafrøði, etniskan uppruna.

11. Brúkarar, ið eru limir í limafeløgunum hjá MEGD hava til tíðir tørv á hjálparum ella stuðli antin frá starvsfólki ella avvarðandi. Hetta merkir, at umstøður teirra - harundir skráir, vegleiðingar, kunningarskjøl, databasur, útgerð ella íløt, mannagongdir at luttaka í gransking o.l. – mugu vera tillagað á hóskandi hátt, soleiðis at brúkarar við breki og varandi sjúku ikki verða fyri mismuni í mun til aðrar borgarar.

12. Heilsuupplýsingar frá fólki, ið bera brek, mugu metast at vera rættuliga viðkvæmar upplýsingar. Smbrt. § 6 krevst ikki samtykki til innsavnan og at flyta diagnosur til Heilsustýrið, við tað at viðgerðargrundarlagið er heimilað í serlóg (ílegulógin) og, at vit í Føroyum enn ikki hava fingið nakran eftirlitsstovn í Føroyum (brekumboð), sum kann hava eftirlit við rættindunum hjá fólki við breki eftir Brekrættindasáttmálanum. Tað hevði ivaleyst verið tryggast, um skipanin sum var frammundan varð brúkt, t.v.s. at søkjast skal um loyvi til viðgerð frá Dátueftirlitinum, sum skal geva loyvi áðrenn ílegur verða innsavnaðar, og at ein nøktandi goymsluskipan verður brúkt.

13. MEGD vil eisini gera vart við, at til tess at tryggja, at mismunur ikki verður framdur grundaður á brek ella varandi sjúku, er alneyðugt at hava eitt dygdargott og væl skipað eftirlit. Tí hevur tað alstóran týdning at fáa ment óhefta og uttanveltaða eftirlitið sambært greinum 33, stykkjum 1-3, í altjóða brekrættindasáttmálanum.

14. Til tess at verja og fremja rættindi hjá fólki, ið bera brek, er harumframt grundleggjandi treyti við skipaðari hagtalsinnsavning hvørs endamál er at skráseta, kanna og granska í, í hvønn mun fólk, orsaka av breki ella varandi sjúku, eru fyri missmuni í mun til aðrar brúkarar. Víst verður tískil til altjóða brekrættindasáttmálan,[2] grein 31, ið staðfestir so ljóðandi:

[2] Uppskot til samtyktar um at seta í gildi fyri Føroyar Sáttmála Sameindu Tjóða frá 13. desember 2006 um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. LM-162/2008.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Hagtals- og dátuinnsavning

Stykki 1

Limalondini átaka sær at savna hóskandi upplýsingar, eisini hagtals- og granskingartilfar, sum ger tey før fyri at orða og seta í gildi reglur, ið seta henda sáttmála í verk. Tá ið hesar upplýsingar verða savnaðar og dagførdar, skal:

a) verða tryggjað, at virkað verður eftir lógini, eisini lóggávuni um dátuverju, til tess at tryggja, at tagnarskylda verður hildin, og at privatlívið hjá fólki, ið bera brek, verður virt;

b) verða tryggjað, at virkað verður eftir altjóða góðtiknum mannagongdum, tá ið hagtøl verða savnað og nýtt, til tess at verja mannarættindi og grundleggjandi frælsi og etiskar grundreglur.

Stykki 2

Upplýsingarnar, sum verða savnaðar sambært hesari grein, skulu verða skildar sundur eftir tørvi og nýttar til at hjálpa limalondunum at meta um, hvussu teimum gongst við at seta tær skyldur, ið tey hava eftir hesum sáttmála, í gildi í innlendis lóggávu og til at eyðmerkja og fara undir tær forðingarnar, sum fólk, ið bera brek, renna seg í, tá ið tey brúka rættindi síni.

Stykki 3

Limalondini skulu taka á seg ábyrgdina av at breiða hesi hagtøl út og tryggja, at fólk, ið bera brek, og onnur sleppa fram at teimum.

Vinaliga vegna MEGD,

Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo